# IMPONERA JÓ





Lagt til rættis Inna Tørnroos og Eydna Skaale
Myndir og hugskot: Amelia Álvur Haraldsen

**Tipp**

Goym tær tómu wc- og køks-rullurnar og ger stuttligar pakkar við teimum!

**GLOYM** TEIR FÝRAKANTAÐU, **KEÐILIGU** PAKKARNAR! Í EINI **HANDAVENDING** KANST TÚ **SKAPA** STUTTLIGAR OG VAKRAR **JÓLAPAKKAR**, IÐ HEILT VÍST **GLEÐA** BÆÐI **MÓTTAKARAN** OG AÐRAR **JÓLAGESTIR**.

## Hetta skal tú eiga inni:

- Pappírsknív
- Saks
- Klistur, ið heftir á báðum síðum
- Pappír
- Toy
- Band

## Taskan

Ger soleiðis:

1. Her skal nógv pappír til. Pappírið skal vera tvær ferðir so breitt, sum gávan er breið, plus einar 3 cm. Pappírið skal vera 2,5 x so langt, sum gávan er lang.
2. Legg gávuna mitt á pappírið, boygg so at pappírið fjalir helvtina av gávuni, og boygg síðani pappírið inn undir, so at tú fær ein vinkul á 45 gradir.
3. Pakka gávuna inn og klistra fast. Boygg endan til ein spíss (sum eitt flogfar) og klistra.
4. Legg eitt band yvirum og boygg spíssin yvir. Boygg so tað sær vakurt út og klistra spíssin fastan. Bind bandið í eina sloyfu og pynta sum tær líkar.

